# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð

## Bygdarráðsfundur tann 27. november 2012, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Evelyn Gaard, Jón Mikkelsen, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen.

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 102**
2. viðgerð av uppskoti til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2012.
J.nr. 2009-392

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 21. november 2012 uppskot til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2012.
Nevndin samtykti at leggja uppskotið til endurskoðaða fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2012 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð.

**Viðv. 102**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 103**
2. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013.
J.nr. 2009-499

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 21. november 2012 uppskot til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013.
Nevndin samtykti at leggja uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2013 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð.

Nevndin mælir til at samtykkja uppskotið við óbroyttum kommunuskattaprocenti á 23% og at barnafrádrátturin framhaldandi er 4.000 kr.
Foreldragjøldini fyri barnaansing verða somuleiðis óbroytt.

**Viðv. 103**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 27. november 2012, kl. $19^{00}$.

**Mál 104**
Staðfesting av almennum fundardøgum í 2013.
Nývalda bygdarráðið fyri 2013-2016 viðgjørdi á fundi 22. november 2012 uppskot til almennar fundardagar fyri 2013.

Nývalda bygdarráðið var samt um hesar dagar:

| | |
|---|---|
| 30. januar | 28. august |
| 27. februar | 25. september |
| 20. mars | 30. oktober |
| 24. apríl | 13. november |
| 29. mai | 27. november |
| 19. juni | 11. desember |

Fundirnir byrja vanliga kl. $19^{00}$.

Heitt verður á bygdarráðið um at staðfesta omanfyri nevndu almennu fundardagar fyri 2013.

**Viðv. 104**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.30.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen

Evelyn Gaard Jón Mikkelsen Bárður Poulsen Siri S. Niclassen